


*Jákup Eli á Lava við sínum 44 ára gamla Ford Mustang, sum hann hevur keypt úr Florida*

# Mustang var dreingjadreymurin

**Ford Mustang var dreingjadreymurin hjá Jákupi Eli á Lava í Havn, sum hevur keypt sær ein svartan Mustang frá 1966**

Eftir at hava leitað í longri tíð á internetinum fann Jákup Eli á Lava fram til tann rætta bilin, sum stóð til sølu í Florida. Hann kontaktaði ein dana sum býr í USA, sum segði gott fyri bilinum.

Bilurin, sum hevur 4,9 litra V8 motor og 302 hk er í góðum standi og hevur fingið føroyskar nummarplátur.

Ford Mustang kom av fyrstan tíð á marknaðin í 1964. Framleiðslan byrjaði í Dearborn í Michigan tann 9. marts 1964, og bilurin kom á marknaðin tann 17. apríl.

Mustang hava verið gjørdir øll árini síðan tá. Tann sum verður gjørdur í dag er fimta generatión, ið varð presentaður í 2005 og kom á marknaðin í 2006.



*Bilurin sær gott út og er í góðum standi*



*Motorurin er ein 4,9 litra V8 við 302 hk*

